Føroyskir fiskimenn uttanlands, ið sigla fyri tey lond tú nevnir, merkja uppskotið á henda hátt:

- Frí ferð millum arbeiðsstað uttanlands og bústað í Føroyum verður ikki skattað

- Fyri føroyskar fiskimenn, sum sigla við norskum skipum, verður tann broyting, at tá tvískatting verður tikin, verður avgjald sambært lov om folketrygd í Noreg talt við sum ein skattur goldin í Noreg.

- Fyri fiskimenn við donskum, norskum, svenskum, finskum og íslendskum fiskiskipum verður eingin broyting í mun til í dag burtursæð frá omanfyri nevndu broyting í viðgerðini av norsku folketrygden. Hetta merkir m.a., at hesir persónar fáa samdøgursfrádrátt.

- Fyri fiskimenn við skipum frá øðrum londum merkir broytingin, at hesir frameftir verða skattaðir sambært grein 25b í skattalógini. Hetta merkir m.a. at hesir ikki koma at fáa samdøgursfrádrátt men frádrátt sambært § 25b.

Tað ikki rætt tá sagt verður, at norðurlendska dupultskattaavtalan er avoldað. Talan er um eina multilaterala avtalu millum øll norðurlond undantikið Grønland, í er fult í tráð við OECD modelkonventiónina fyri dupultskattaavtalur.

Praktisku trupulleikarnar við við V-tali eiga tit at taka upp við TAKS

Vinarliga

Petur Alberg Lamhauge